## Ov tíðliga fødd mugu síggja foreldrini

Kanningar í Noregi vísa, at børn, ið eru fødd ov tíðliga hava stóran fyrimun av at síggja nógv til foreldrini hjá sær. Fyrr børn og foreldur eru saman, jú skjótari læra børnini og foreldrini at samskifta. Kanningarnar vísa millum annað, at foreldrini duga nógv betri at reagera upp á tørvin hjá børnunum, um tey hava verið við í menningini hjá barninum frá tíð fyrstu tíðini eftir, at barnið er føtt. Kanningini vísti eisini, at genturnar mennast skjótari enn dreingirnir, og hava eftir einum árið nógv betri samskiftisevnir enn dreingirnir um sama aldur. Kanningin var gjørd fyri øll børn, ið vigaðu undir 2000 gramm í Norðurnoregi frá 1999 til 2002. Talan er um 140 børn. At samanbera við eru eisini 75 børn, ið vóru født til tíðina í sama øki.

## Breyt rútin í grannahúsinum

Sunnunáttina misti ein miðaldrandi maður lykilin til húsini hjá sær burtur í býnum. Tá hann kom heim hugsaði hann sær helst at bróta inn til sín sjálvs, fyri síðani at leggja seg. Hetta kundi gingið so nøkulunda, um tað ikki var fyri tað, at maðurin breyt rútin í grannahúsunum. Fólkini í húsunum ringdu til løgregluna, og endin var at maðurin fann útav, at hann var komin skeivt, og helst fer hann eisini at gjalda fyri rútin. Maðurin var koyrdur heim, men verður helst ikki ákærdur fyri herverk, tí mann skal vita, at mann ger seg inn á ognirnar hjá øðrum, um talan skal vera um herverk.

# Minni fiskur upp á land

**Hagtøl vísa, at munandi minni fiskur er komin upp á land fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í ár sammett við 2007**

FISKISKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fiskiveiðan er munandi minkað fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í ár. Tilsamans er talan um eina minking í tonsum upp á smá 8.500 tons og í virði er talan um minking upp á 214 milliónir krónur svarandi til 22%.

Av runda fiskinum er tað serliga hýsan og upsin, sum er minkaður, ávikavist 4.558 tons svarandi til heili 42% og 4.835 tons svarandi til eina minkming á 11%.

Toskur og annar botnfiskur er kortini bert minkaður ávikavist 449 tons og 693 tons, svarandi til eina minking á ávikavist 5% og 6%.

Tilsamans er veiðan eftir botnfiski minkað við góðum 10.500 tonsum út 77.725 tonsum niður í 67.190 tons, ein minking á 14%.

Eisini veiðan eftir flatfiski er minkað úr 5.399 tonsum niður í 4.918 tons. Tó skal viðmerkjast, at veiðan eftir svartkalva er vaksin úr 1.019 tonsum upp í 2.202 tons. Sama er galdandi fyri »Onnur fiskasløg«, har veiðan er vaksin úr 15.094 tonsum upp í 20.443 tons, ein vøkstur í tonsum upp á 35%, tó bert ein vøkstur í virði á 7%.

Samlaða veiðan tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar í ár var 93.976 tons móti 102.413 tonsum sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein minking upp á 8.437 tons svarandi til 8%, men virðið er tó minkað væl meiri úr 966 milliónum krónum niður í 752 milliónir, ein minking á 214 milliónir svarandi til 22%.




*Munandi minni av fiski er avreiddur um avreiðingarskipanina tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar í ár sammett við í fjør*

## Kreppurakt-ur banki yvirtikin

**EBH Banki er nú yvirtikin av einum dóttirfelag til tað statsliga avviklingsfelagið fyri bankar í kreppu**

BANKAKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jørn Astrup Hansen er valdur í nevndina í statsliga dótturfelagnum, sum hevur yvirtikið EBH Bank*
Savnsmynd

Hart kroysti EBH Bank heimahoyrandi í Fjerritslev er nú yvirtikin umvegis statsliga avviklingsfelagið fyri neyðstaddar bankar. Dóttirfelagið hjá avviklingsfelagnum – Bankpartabrævafelagið av 21. november 2008 A/S undir stovnan – hevur undirskrivað treytaðu yvirtøkuavtaluna.

Eftir yvirtøkuna fær dóttirbankin hjá avviklingsfelagnum navnið EBH Bank av 2008 A/S. Nevndin er vald á aðalfundinum: Jørn Astrup Hansen (formaður), Michael Meyer (næstformaður), Erik Fosgrau og Visti Nielsen. Seinast nevndi virkar hartil sum fyribils stjóri, til ein nýggjur verður valdur.

Formaðurin fyri avviklingsfelagnum, Henning Kruse Petersen, er fegin um, at nevndin hevur viljað tikið uppgávuna á seg.

Allir privatkundar, vinnukundar og fíggjarligir íleggjarar hjá EBH Bank hava fulla trygd fyri teirra pengum. Aktionerarnir hinvegin mugu síggja í eyguni, at teirra pengar eru farnir, sigur hann í einum tíðindaskrivi.

EBH Banki er insolventur og manglar eina hálva milliard krónur. Fíggjareftirlitið gav fríggjadagin bankanum eina freist til komandi fríggjadag, 28. november, til at seta trygd fyri, at bankin er solventur, skrivar Business.dk